*Óvist er, hvussu verður við fiskavirkinum í Vestmanna, nú alt bendir á, at fiskavirkini í Runavík og á Toftum verða tey fyrstu, sum lata uppaftur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**» Enn veit eingin við vissu, hvat nýggja samtakið ætlar við virkinum í Vestmanna**

# 25-30 fólk í óvissu

**ÓVISSA Enn vita tey umleið 25-30 fólkini, sum starvast á landingarmiðstøðini Kongshavn, ikki, hvør teirra lagna verður.**




Hóast tey ikki eru søgd úr starvi, liggur teirra lagna á arbeiðsmarknaðinum kortini í óvissu.

Landingarmiðstøðin Kongshavn var ikki við í keypinum, tá nýggja samtakið keypti fýra fiskavirki og seks skip.

Nú tey seks skipini, sum áður vóru partur av Faroe Seafood-samtakinum, eru farin útaftur - men undir nýggjum eigarum - vita tey á landingarmiðstøðini Kongshavn ikki, hvar skipini fara at landa.

– Nei, vit hava einki hoyrt um, hvussu verður, men vóna sjálvsagt, at skipini eins og áður koma at landa her hjá okkum.

Á Kongshavn, har eini 25-30 fólk plagdu at arbeiða, tá ið mest var at gera, eru tey hørm um, at arbeiðspláss teirra liggur í slíkari óvissu.

– Vit vita einki við vissu, men hava tó skilt, at ein avgerð fer at fella skjótt, siga tey.

Landingarmiðstøðin Kongshavn, sum man vera hin størsta í Føroyum í nøgd, hevur ikki verið insolvent, men hevur verið rikin við einum lítlum avlopi á hvørjum ári.

Tá umstøðurnar eru, soleiðis sum tær eru í løtuni, eru nógvar gitingar um, hvør fer at keypa.

Eingin vissa fæst tó fyri nøkrum, fyrr enn ein møgulig søla er farin fram.

Spurningurin er, um samtakið, sum keypti fýra virkir og seks skip, eisini hevur hug at ognað sær landingarmiðstøðina – ella, um tað verður onkur heilt annar, sum keypir.

Tað fer so tíðin at vísa.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Gongur væl hjá trolarum í Hvalba

**HVALBA Tað hevur gingið væl hjá trolarunum í Hvalba at fiska, síðan tað lpysnaði millum manningarfeløg og reiðarar, og skipinifóru aftur til fiskiskap**

**Vilmund Jacobsen**

Partrolaraparið í Hvalba, Hamranes og Breiðanes, hava longu gjørt fleiri túrar, síðan verkbannið var av. Skipini landaðu í Hvalba seinasta mikudag, og væntandi koma tey innaftur miðskeiðis í hesi vikuni. Á seinasta túri høvdu tey 220.000 pund av góðum upsa tilsamans. Túrarnir hjá Hamranesi og Breiðanesi eru ikki langir, og soleiðis hava skipini eisini betri møguleikar at sigla til lands við góðum fiski.

Í Hvalba siga tey, at upsin, sum skipini hava fingið í seinastuni, hevur verið rættiliga góður, meginparturin er 1,2 og 3'arar.

Men tað eru ikki bara Hamranes og Breiðanes, sum landa í Hvalba.

Djúpvatnstrolararnir, Steintór og Niels Pauli, eru eisini farnir at partrola eftir upsa, og sum skilst, hevur hetta riggað væl hjá teimum.

Í Hvalba siga tey, at Steintór og Niels Pauli koma inn at landa mikudagin.

Rættiliga nógv fiskaarbeiði er á TG Seafood í Hvalba, og er tað soleiðis, at tey klára at arbeiða alt undan, sum skipini í Hvalba leggja upp, verður fiskur keyptur úr Vági, har landingarmiðstøðin aftur er komin upp at koyra.

– Jú, her er rættiliga nógv fiskaarbeiði hvønn einasta yrkadag, sigur Ólavur Bjarkhamar, sum er stjóri á TG Seafood.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Teir, sum manna Hamranes og Breiðanes, eru rættiliga óførir at fiska – og teljast millum teir allar fremstu*